Horn, klaver og raddir

Havnar Hornorkestur:

Blue Plume — marsjur — (C.H. Jaeger)
Capriol Suite — 1., 2. og 6. partur — (Peter Warlock)
Greensleeves — fólkalag — (Ltr.: Gordon Langford)
Salut d'Amour (Edward Elgar)

Martin Pollard:

Sonata í Cis-mol fyri klaver nr. 2, opus 27
Mánalýsissonatan (Ludwig van Beethoven)
Fantaisie-Impromptu nr. 4, Cis-mol, opus 66 (Frederic Chopin)

Havnar Hornorkestur:

English Folk Songs — suita í 3 pørtum — (R. Vaughan Williams, Lrt.: Frank Wright)
The Girl I Left Behind Me — fólkalag — (Lrt.: Gordon Langford)

Steðgur í 15 minuttir

Kristiliga Sangkórið:

Take Me Hand Precious Lord (Orð og lag: T.A. Dorsey, Ltr.: Ed Lojesky)
Top of the World (Orð: John Betties, Lag: R. Carpenter, Ltr.: Ed Lojesky)
Elijah Rock — Negro Spiritual — (Ltr.: Jester Hairston)

Havnar Hornorkestur:

Svínoyarmarsjurin (Jens Guttesen)
Einki er sum summarkvøld við strendur (Hans J. Højgaard, Ltr.: Robert Oughton)
Føroya ítróttarmarsjur (Jógvan Waagstein, Ltr.: Rodney Bashford)
Symfony in C í trimum pørtum (Gossec-Molenaar)
The Bold Gendarmes fyri tríggjar trombonir (Offenbach, Ltr.: E. Siebert)
Ritual Fire Dance (Manuel de Falla, Ltr.: Allan Street)
West Side Story — úrval — (L. Bernstein, Ltr.: Denis Wright)
March Militaire nr. 1, opus 51 (Franz Schubert)

Í morgin kl. 16.00 verður heystkonsertin hjá Havnar Hornorkestri í Norðurlandahúsinum.

Har verður ikki einans horntónleikur at hoyra, men eisini klaverspæl og kórsangur.

Bretski musikkskúlalærarin Martin Pollard spælir klaver og Kristiliga Sangkórið, sum Bjarni Restorff stjórnar, syngur tríggjar sangir.


Andrew Hurrell stjórnar Havnar Hornorkestri. Hann avloysti Robert Oughton sum venjara í september.

Heini Davidsen verður frásøgumaður á konsertini í morgin.

estra
Tlf. 41085 . 510 Gøta
Telefax 41673
Vit prenta tað vit kunna – og kunna



Á hvíta tjaldinum



Jack Murphy (Charles Bronson) er løgreglumaður. Hann hevur ringar dagar: konan er rýmd frá honum, bilurin er stolin, mafian hevur sett hann á listan við teimum, sum skulu fyribeinast og onkur roynir at fáa hann skuldsettan fyri fleiri dráp, hann onki veit um.

Tað eydnast Murphy at rýma undan starvsfeløgum sínum. Men ólukkutíð fyri hann hevur hann júst í teirri løtuni eina freka gentu í handjørnum. Hann hevur tikið hana fyri stuldur. Og nú noyðist hann at taka hana við sær, tá hann rýmir.

Einasta vón hjá Murphy er at finna og taka rætta dráps-mannin, áðrenn løgreglan ella mafian finna Murphy. Leikstjóri er Hollywood-veteranurin J. Lee Thompson, sum m.a. hevur gjørt spennandi filmar sum Byrsurnar í Navarone og Nám Salomons kongs (nýggjasta útgávan við Richard Chamberlain).

Fyrsta sýning í Leikhús Bio sunnudagin kl. 22.00.



Veitsla í Vættravík

Ella Smith Clementsen í Havn hevur á egnum forlagi givið út barnabókina »Veitsla í Vættravik«.

Hetta er ein jólabók ætlað smærri børnum at lesa og lita. Anni Arge Jacobsen hevur teknað myndirnar.

»Veitsla í Vættravík« er sett og umbrotin á Sosialinum og prentað hjá Prent í Havn.

Bókin 24 síður og kostar 40 kr. heft.

Pinkur

»Pinkur og óljóðabilurin« kallast klaffa-myndabókin, sum forlagið Nýlendi gevur út.


Richard Fowler hevur skrivað og teknað bókina, men tað stendur ikki í henni, hvør hevur umsett. Vit gita Jákup í Skemmuni.

Bókin er um tann ólátaða bilin hjá Pinki Pinkssyni. Pinkur hoyrir ymisk undarlig ljóð úr bilinum og tá hann so letur upp hurðar og lúkur, sær hann, hvaðan hesi ljóð stava. Og tað kunnu børnini eisini gera.

Bókin kallast klaffabók, ti klaffar eru á flestu síðum.

»Pinkur og óljóðabilurin« er sett í Danmark og prentað í Singapore. Hon er innbundin og prentað á sterkt pappír.

Kostnaðurin er 75 kr.



Pinkur og bilurin F 99 999



LFÚ stuðlar FUT

Tollurin á ljóðførum og aðrari útgerð til tónlistaframførslur er nógv hægri í Føroyum enn í grannalondunum.

FUT, Føroya Undirhaldstónleikarafelag, hevur fingið stuðul í kravinum um minni ella ongan toll á ljóðføri.

Stjórnin í LFÚ, Landsfelag Føroyinga í Útbúgving, samtykti týsdagin soljóðandi yvirlýsing:

L.F.Ú. tekur fult undir við kravinum hjá F.U.T. um at fáa tolllætta uppá ljóðføri.

L.F.Ú. heldur tað vera orættvist, at tónleikarar verða skattaðir sum vinnurekandi, meðan amboð teirra verða tollað sum marglæti.

Vit átala harðliga framferð landsstýrisins í hesum máli.